# r móttikin n ørmum



Atlantic Navigator er størsta fiskiskipið í føroyska flotanum og telist millum heimsins størstu trolarar. Framleiðslan av surimi umborð á trolaranum svarar til 2,5 prosent av heimsmarknaðinum

Mynd: Anna V. Ellingsgaard

**Nógv fólk umborð**

Hanus Hansen, stjóri í JFK-samtakinum, ið samstarvar við norska Aker um verkætlanina, takkaði fyri móttøkuna. Hann segði seg hava stórar vónir til nýggja skipið, sum hann vónaði fór at roynast føroyingum væl.

Eftir at almenna móttøkan hevði verið, sluppu fólk umborð at síggja skipið, og tí tilboðnum vóru tað sera nógv fólk, sum tóku av.

Tá ið Næraberg kom til landið fyri nøkrum árum síðani var lítið og einki gjørt burturúr. Kanska var sjálvsáltið tá ikki so stórt, sum tað tykist verða nú, tí bæði føroyingarnir og útlendingarnar, sum starvast við svartkjaftaverkæltanini, kenna seg vísar í, at tað fer at bera til at vinna pengar burtur úr at framleiða svartkjaft til matna.




Fólk úr øllum landinum vóru til staðar, tá ið Atlantic Navigator kom til Klaksvíkar fyri fyrstu ferð sunnudagin. Klaksvíkar býráð skipaði fyri móttøku, og JFK bjóðaði fólki umborð at síggja skipið.

Myndir: Bárður Lydersen



– Atlantic Navigator er tað týdningarmesta skipið, sum føroyingar hava, tí hetta skipið virðisøkir fisk, sum annars bara hevur verið framleiddur til fiskamjøl, sigur Kjell Inge Røkke, sum er sannførdur um, at hansara svartkjaftaprojekt í Føroyum fer at bera til

Mynd: Bárður Lydersen

# – Vit fara at heysta tað sum vit hava sátt

**– Áðrenn tú kanst heysta, mást tú sáa. Vit hava nú sátt í fimm ár, men eg eri sannførdur um, at vit koma at heysta tað, sum vit hava sátt, sigur Kjell Inge Røkke, sum hevur brúkt 100 milliónir krónur til verkætlanina við Næraberg. Nú skal Atlantic Navigator taka seinasta stigið, so at svartkjaftaverkætlanin í Føroyum fer at kasta pengar av sær, og Røkke heldur, at føroyingar skulu fáa sær fleiri slík skip**

ATLANTIC NAVIGATOR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Higartil hevur norski vinnulívsmaðurin Kjell Inge Røkke sett nógvar pengar til í svartkjaftaprojektinum í Føroyum.

Samstarvið millum Aker Seafood og JFK um Næraberg kastaði ongantíð pengar av sær, men verkætlanin tók støðug stig rætta vegin, og nú skal eitt enn størri skip syrgja fyri, at verkætlanin fer at kasta pengar av sær.

– Aker hevur brúk einar 100 milliónir higartil til hetta projektið, og tað hevur ikki bara verið lætt. Men eg havi altíð trúð upp á, at tað loysir seg at fiska og framleiða svartkjaft til matna, og nú kenni meg fullvísan í, at hetta fer eisini at bera til í Føroyum, sigur Kjell Inge Røkke.

– Áðrenn tú kanst heysta, mást tú sáa. Vit hava nú sátt í fimm ár, men eg eri sannførdur um, at vit koma at heysta tað, sum vit hava sátt.

**Sinnaður at satsa**

Kjell Inge Røkke hevur í síni tíð sum vinnulívsmaður mangan víst treiskni, og tað hevur hann eisini víst í føroyska projektinum. Hóast hann verður spurdur um, hvussu langan snór hann er sinnaður av geva føroysku verkætlanini, so fær hann illa svara, tí hann kennir seg sannførdan, um at ætlanin fer at loysa seg í longra lagi.

– Hetta fer at bera til. Nú hava vit sett pengar til í fimm ár, men tað fer at venda, so at vit frameftir koma at vinna pengar. Tú kanst siga, at um vit missa pengar í eini 10 ár afturat, so ber kanska ikki til at halda fram, men so langt koma vit als ikki, tí hetta fer at bera til, sigur Kjell Inge Røkke.

– Atlantic Navigator er tað týdningarmesta skipið, sum føroyingar hava, tí hetta skipið virðisøkir fisk, sum annars bara hevur verið framleiddur til fiskamjøl. Føroyingar eiga at síggja møguleikarnar í at framleiða surimi, tí tað kastar nógv meira av sær til samfelagið, enn fiskamjøl ger.

**Fleiri slík skip**

Kjell Inge Røkke heldur, at føroyingar eiga at fáa sær fleiri slík skip sum Atlantic Navigator fyri at fáa sum mest burturúr fiskinum.

– Eg rokni við, at tað kemur av sær sjálvum. Onnur skip fara at framleiða svartkjaft til matna í Føroyum, tá ið vit hava fingið okkara verkætlan at bera seg, sigur Røkke

Hann heldur, at hansara leiklutir í føroyskari fiskivinnu hevur víst, at hann er sinnaður at arbeiða langsiktað fyri at fáa nakað burturúr.

– Vit fiska fisk, sum føroyingar eiga, og tí skulu vit eisini hava føroyska samfelagið í huganum í hesum projektinum. Vit hava arbeitt í fimm ár við hesum, og vit hava víst, at vit arbeiða langsiktað og seriøst. Eg haldi, at vit hava uppiborið at vera partur av føroysku fiskivinnuni, sigur Kjell Inge Røkke.

– Eingin hevur framleitt svartkjaft til matna á sjónum við eydnu í Føroyum áður, men har hevur Aker ein serkunnuleika, sum vit kunnu brúka her í Føroyum. Og tá ið hetta fer at kasta pengar av sær, fara Aker og føroyingar at heysta í felag.